## Obama fekk sín vilja

Tað eydnaðist í nátt Barack Obama, forseta at fáa meirilutan av Umboðsmannatinginum at atkvøða fyri uppskoti hansara um eina nýskipan á heilsuøkinum. Uppskotið skuldi hava minst 216 atkvøður, og tá atkvøtt varð, atkvøddu 219 tinglimir fyri, og 212 atkvøddu ímóti. Sostatt eydnaðist tað Barack Obama at fáa undirtøku fyri einum av sínum høvuðsmálum, sum í veruleikanum fer at útvega øllum amerikanarum sjúkratrygging. Nýskipanin er tann størsta innan amerikanskan heilsupolitikk í næstan 50 ár, og sjúkratrygging hevur verið eitt politiskt evni í USA í næstan eina øld.



## Halda eyga við Køtlu

Hóast gosið við Eyjafjallajøkul í Íslandi eftir øllum at døma ikki verður eitt av teimum stóru, bera íslendskir jarðfrøðingar ótta fyri, at tað kann gera, at tað betur kenda gosfjallið Katla fer at goysa. Páll Einarsson, jarðfrøðingur, sigur við Morgunblaðið, at sambært søguni hava øll gos í Eyjafjallajøkli elvt til gos í Køtlu, og tí fara jarðfrøðingarnir at halda eyga við Køtlu ta næstu tíðina. Eitt gos í Køtlu fer uttan iva at elva til, at jøkulsísurin fer at bráðna, og tað kann so elva til varnflóð. Tað seinasta gosið í Køtlu var í 1918.

# Havnin skal menna Føroyar

**Tórshavnar kommuna ætlar sær at ganga á odda í arbeiðinum at stega fráflytingini og gera livi- og bústøðurnar betri í Føroyum. Einki ítøkiligt er enn komið fram um, hvat gerast skal**




*Heðin Mortensen, borgarstjóri og kommunustórin Ingibjørg Berg løgdu ætlanina fram*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

TRIVNAÐUR OG VÆLFERÐ
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tað er einn sannroynd, atein stórur partur av ungdóminum, sum fer burtur at útbúgva seg ikki kemur heimaftur. Framskrivingarnar siga, at fólkatalið fer at minka.

Í trý ár hevur Tórshavnar kommuna arbeitt við eini ætlan um, hvat gerast kann, og á fundi hóskvøldið samtykti eitt samt býráð at fara undir eina verkætlan við at menna føroyska samfelagið.

Henda ætlan varð løgd fram á fundi í morgun, har 20 umboð fyri kommununa vóru við. Har vóru býráðslimir, deildarleiðarar og onnur starvsfólk hjá kommununi umframt ein konsulentur, sum kommunan hevur sett á uppgávuna.

Heðin Mortensen og onnur løgdu stóran dent á, at alt býráðið stendur aftan fyri verkætlanina, og at ætlanin er gjørd í samráð við fakfeløg, vinnulívið og onnur.

Málið er at menna útbúgvingarmøguleikar, lærumøguleikar, býurin skal hava fleiri mentanarlig boð, og bústaðarmøguleikarnir skulu betrast. Alt fyri at halda upp á ungdómin.

– Men er hetta ikki ein landsuppgáva, sum kommunan hevur átakið sær?

### Skumpa undir landið

- Havnin skal vera drívmegin, sum skumpar undir landsmyndugleikarnar, sigur Jógvan Arge, formaður í mentanarnevndini.

Útbúgving er landsmál, men mentanartilboð og húsabygging eru kommunal.

Upplýst varð á fundinum, at stórir býir sum Stavanger í Noregi og Århus í Danmark hava líknandi verkætlanir, og teimum hevur Tórshavnar kommuna skeitt eftir.

Tað fæst ikki at vita, hvussu nógvan pening kommunan hevur brúkt og fer at brúka upp á hesa ætlanini. Tað liggur alt inni í fíggjarætlanini, sigur Heðin Mortensen, borgarstóri.

Ætlanin, sum løgd varð fram í morgun, var oringar um, at høvuðsstaðurin skal vera livandi og hava avbjóðingar og hava tryggleika og nærleika. Høvuðsstaðurin skal vera virkin, geva pláss fyri nýggjum vinnum, veita góða tænastu og tæna øllum føroyingum.

Einki ítøkiligt varð nevnt. Tað kemur okkurt ítøkiligt fram seinni í ár, varð upplýst.

Kommunan skal í hesi ætlanini samstarva bæði við kommunur og landsmyndugleikarnar.

### Miðsavning neyðug

Mest ítøkiliga viðmerkingin kom frá Jan Christiansen, býráðslimi:

- Tað er rætt, at her er einki ítøkiligt. Allir býráðslimir hava síni ynski til framtíðina, og hetta er ein samanseting av øllum teimum ynskjunum.

- Men vit verða noydd til at miðsavna hetta lítla samfelagið. Vit klára ikki at hava fleiri deplar, og tí skal hetta eisini vera ein áheitan á onnur støð um at síggja Havnina sum høvuðsstað.

Býráðslimirnir flenna, tá ið vit spyrja, hví henda visiónin skal hava nakra framtíð, tá ið einki spurdist burtur úr landsins visión 2015.

- Munurin er, at tá var ikki politisk semja tvørtum um andstøðu og samgongu, og landstýrið hevði ikki fakfeløg, vinnulív og onnur við sær, sigur Heðin Mortensen.

# Nýggj bók um skattarætt

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út bókina Føroyskur Skattarættur, sum Eyðfinnur Jacobsen, advokatur, hevur skrivað. Bókin er ætlað til undirvísing á Handilsskúlum og Fróðskaparsetri, men kann eisini vera hent handbók hjá grannskoðarum, advokatum og øllum øðrum, sum fáast við skattafaklig evni

Bókin er vaksin fram úr undirvísing á merkonomskeiðum, sum rithøvundurin javnan hevur staðið fyri í eini 25 ár. Umframt at undirvísa í evninum, hevur Eyðfinnur Jacobsen í starvi sínum sum advokatur brúkt ein stóran part av arbeiðsorku síni til at veita einstaklingum, stovnum og virkjum úti og heima ráðgeving um føroyskan inntøkuskatt.

Arbeiðið at skriva bókina byrjaði av álvara fyri um leið fimm árum síðan, tá ið samtakið av loyvishavarum at leita eftir kolvetni á føroyskum havleiðum undir heitinum The Faroes Partnership við Amerada Hess á odda veitti Eyðfinni stórfingna peningaupphædd, sum gjørdi tað møguligt at leggja annað arbeiði til víks.

Bókin viðger øll evni um føroyskan inntøkuskatt á einum almennum stigi eftir lóggávu og rættarvenju, sum var galdandi 1. januar í 2009. Bókin, sum kostar 395 kr., er 294 blaðsíður við drúgvum leitorðalista. Útgevari er Føroya Skúlabókagrunnur. Vasti hevur gjørt uppseting og kápu og Estra tók sær av prentumsitingini.

